## Christian flytur niður

Í gjár varð tað mest sum staðfest, at Lyngby næsta kappingarár fer at spæla í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Felagið hjá Christian Lamhauge Holst og Tem Hansen var í Århus, har botnuppgerð ímóti AGF var á skránni. AGF skoraði til 1-0 í 1. minutti, og hóast Christian Lamhauge Holst javnaði í 34. minutti, so vann AGF 3-1. AGF sigurin ber við sær, at AGF á triði aftasta plássi nú hevur 24 stig, meðan Lyngby á aftasta plássi hevur 12 stig.



## Hjulmand setir nýtt mál

Eftir tapið hjá lyngby ímóti AGF í gjár, tykist støðan hjá Lyngby í superliguni vónleys. Liðið hevur nú 12 stig fram til bjargingina. - Nú er skalt tú verða vónleysur optimist fyri at trúgva uppá, at vit kunnu halda okkum í superliguni. Næstu dagarnar skulu vit tosa saman og seta okkum nýtt mál fyri restina av kappingini, sigur venjarin Kasper Hjulmand við BT.

### Endaliga støðan í FM gjørdist:

**Kvinnuunglingar**
**Einmansleikur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttur, TBF
2. Susie Midjord, TBF

**Tvímansleikur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttur og Susie Midjord, TBF

**Mansunglingar**
**Einmansleikur:**
1. Rói Agnarsson, Tór
2. Hallur Thorsteinsson, Tór
3. Fróði Jensen, TBF

**Tvímansleikur:**
1. Rói Agnarsson og Hallur Thorsteinsson, Tór
2. Fróði Jensen og Tróndur Tummasarson, TBF
3. Magnus Johansen KÍ og Jákup Thomasen, TBF

**Meðaldeild menn**
**Einmansleikur:**
1. Ólavur Niclasen, KÍ2. Karl Arni Egholm, KÍ3. Kai Roest, TBF

**Tvímansleikur:**
1. Vagnur Nolsøe og Kai Roest, TBF
2. Karl Arni Egholm og Jóel Bringsberg, KÍ
3. Ólavur Niclasen, KÍ og Andras Nolsøe, TBF

**Meistaradeild kvinnur**
**Einmansleikur:**
1. Rakul Mikkjalsdóttur, TBF
2. Marin í Dali, TBF
3. Susie Midjord, TBF

**Tvímansleikur:**
1. Marin í Dali og Rakul Mikkjalsdóttur, TBF
2. Susie Midjord og Mariann Mikkjalsdóttur, TBF

**Meistaradeild menn**
**Einmansleikur:**
1. Ragnar Egilsson, Tór
2. Rói Agnarsson, Tór
3. Hallur Thorsteinsson, Tór

**Tvímansleikur:**
1. Petur Niclasen og Ragnar Egilsson, Tór
2. Fríði Jensen og Fróði Jensen, TBF
3. Hallur Thorsteinsson og Rói Agnarsson, Tór

**Blandaður tvímansleikur**
1. Marin í Dali og Fróði Jensen, TBF
2. Rakul Mikkjalsdóttur, TBF og Ragnar Egilsson, Tór
3. Susie Midjord og Tróndur Tummasarson, TBF

**Ársins leikari, kvinnur:**
Rakul Mikkjalsdóttur, TBF

**Ársins leikari, menn:**
Ragnar Egilsson, Tór

**Ársins stjørnuskot:**
Fróði Jensen, TBF

**Ársins herðaklapp:**
Claus Olsen og Sveinbjørn Danielson, Royn

# Rakul gjørdi bart

**BORÐTENNIS**
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

*Rakul gjørdi bart*

Hjá kvinnum var 15 ára gamla Rakul Mikkjalsdóttur av Tvøroyri einaráðandi. Hon vann hjá gentum, kvinnuunglingum og hjá kvinnum. Í kvinnufinaluni gjørdist tað ein spennandi finala millum Rakul og Marin í Dali, sum eisini er av Tvøroyri. Báðar byrjaðu heldur spakar, men Marin vann skjótt yvirvágina. Rakul spældi ikki upp til sítt besta, og Marin kom skjótt og lætt á odda 2-0. Eftir hetta fann Rakul seg sjálva, og vann seg upp á 2-2. Í síðsta og avgerandi settinum dró Rakul longra stráðið, og tískil kann hon, hóast sín unga aldur, kalla seg føroyameistari hjá kvinnum 2008.



*Rakul Mikkjalsdóttir staðfesti so ruddiliga, at hon er fremsti borðtennis-spælarin á kvninusíðuni*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

### Taktiskt

- Eg royndi at hugsa um hvat hon ikki dugdi so væl, og síðan legði eg meg eftir tí, segði Rakul Mikkjalsdóttur eftir dystin, og helt fram: - Hetta hevði nógv at siga fyri meg. Hetta er fyrstu ferð eg vinni ein so stóran heiður, og eg havi vant fram ímóti hesum í langa tíð.

Kappingarárið í Føroyum er av á hesum sinni, men í komandi mánað skal ungdómslandsliðið til Danmarkar at luttaka í DM.

- Næsta mál er at vinna NM, sigur Rakul, sum í fjør gjørdist danskur Grand Prix-vinnari.

# Guri og Niclas føroy

**Niclas Eysturoy tekur seg framvegis nógv fram, og skal væntandi luttaka í OL 2012 fyri danska landsliðið**

**BADMINTON**
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Báðar FM-finalurnar í badminton vóru endurtøka av teimum finalunum, sum vórðu spældar í fjør. Hjá monnum møttust Niclas Eysturoy og Aksel Poulsen, meðan Guri Poulsen og Brynhild D. Carlsson høvdu leikt seg í kvinnufinaluna. Í ár gjørdist ein vinnari hin sami sum í fjør.

### Niclas Eysturoy

Flestu orðini munnu liggja í navninum á hesum manni, ið hevur talent fram um tey flestu. 19 ára gamli havnamaðurin skal eftir ætlan vera við í fyrireikingunum hjá danska badmintonlandsliðnum, sum innan leingi fer at brynja seg til OL 2012. Í fjør var hann tætt við at gerast føroyameistari, men hann tapti fyri Akseli Poulsen. Aftur í ár møttust hesir harrar, men hesaferð var tað Niclas, ið dróg longra stráðið.

Niclas byrjaði nógv betur og kom á odda heili 12-3. Hesa løtuna vísti Niclas stóran neyvleika, og Aksel fann ikki seg sjálvan. Sum settið leið spældi Aksel seg upp, men hetta var ikki nokk, og Niclas tók fyrsta settið. Í næsta setti reisti Aksel seg mannliga, og vann trygt. Hetta noyddi teir báðar út í eitt síðsta og avgerandi sett. Í hesum settinum var Aksel eitt vet omanå fyri tað mesta, og helt eina leiðslu upp á 2-3 stig. Leiðslan helt tó ikki á mál, og móti endanum av settinum beit Niclas frá sær, og vann settið 21-17.

### Guri og aftur Guri

Stóra navnið í føroyskum kvinnubadminton er Guri Poulsen. Í fjør var tó um reppið, at unga Brynhild D. Carlsson knógvaði henni, men lámi leikarin úr HBF helt tørn. 17 ára gamla Brynhild D. Carlsson fekk í ár møguleika at hevna seg, tí í finaluni bíðaði nevniliga Guri Poulsen. Lítil ivi var um, at Guri er hin royndari leikarin, men Brynhild hevur staðið seg væl, og eisini vunnið sær pláss á landsliðnum.

Finalan byrjaði sera tøtt og spennandi, men tá ið komið var áraka helvtina, dró Guri frá og tryggjaði sær fyrsta sett. Somu byrjan